MÓTTØKA AV ULL

Í sambandi við, at ullamóttøkur vórðu settar á stovn, skal vera sagt frá, at tikið verður ímóti ull soleiðis:

Frá hósdegnum 8. juli 2004 - kl. 10.00 - 17.00

á Tøting í gøtu tlf. 44 10 20
hjá Sirri í vági tlf. 37 40 06

Fyri ull, ið er turr og væl hagreidd, lata ullamóttøkurnar vørur í býti, svarandi til 2,- kr. fyri kilo av ull. Umfram fær innlatarin 4,- kr. fyri kilo í stuðulsískoytið, sum verður flutt gjøgnum Gjaldstovuna á upplýsta konto í peningastovnunum.

tann parturin av ullini, sum ikki kann gagnnýtast, skal vera skildur frá og beindur burtur á staðnum ella á rættini á forsvarligan hátt.

Gjørt verður tí vart við, at ullamóttøkan skilar sær rætt til at geva lægri ella ongan prís fyri ull, sum ikki kann gagnnýtast, t.v.s. ull við skarni, sandi, mosa o.ø. í.

Flutningsstuðul á 2,- kr. fyri kilo verður latin til innlatarar, sum ikki búgva í streymoy, eysturoy ella suðuroy.

Alm. Royndir og ráðgeving
Royndarstøðin
FO-410 Kollafjørður

Sosialurin 341800

LUTASEÐIL

1. Toyota Yaris 1.3 Terra v. komfort (Frá Reyni Service)	virði	169.600 kr.
2. Ferð fyri 2 vaksin og 2 børn við bili Tórshavn-Hanstholm t/r við uppihaldi í eina viku í Danland ella DanCenter (Frá Smyril Line)	virði	19.995 kr.
3. Gávukort frá Thomas Dam á Hálsi	virði	10.000 kr.
4. Gávukort frá Statoil Føroyar	virði	5.000 kr.
5. Gávukort frá Statoil Føroyar	virði	5.000 kr.
6. Gávukort frá LM handlinum	virði	5.000 kr.
7. Gávukort frá Radiohandlinum v/ E. & P. Persson	virði	5.000 kr.
8. Føroyskt krov	virði	1.000 kr.

Drigið verður bara millum seldar seðlar. Drigið verður týsdagin 3. august á Elektron og lýst í bløðunum 4. og 5. august 2004.

Fæst á Statoil støðunum kring landið

Hestprent 314 555

STATOIL

Tórshavnar Ítróttarráð 2004 **20 kr.**

HALDIÐ SOSIALIN

450,- um ársfjórðingin
- sparið **395,-** í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Sosialurin

ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ______
Bústaður: ______
Postnr.: ______
Bygd/býur: ______
Telefon nr.: ______
Undirskrift: ______

Ókeypis
Verður sent ófrankerað
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Stórt grundstykki á Eiði

Í Korndali, veðurbesta plássi á Eiði, er grundstykki, matr.nr. 81, 1126 m² til støddar, til sølu, um hóskandi boð fæst. Vatn og telefon er lagt inn á stykkið, sum er nóg stórt til at býta í tvey.

Tlf. 423066/218028

Vit svara alt samdøgrið...
Call us day and night...

TAXI

BIL 31 14 44 Mini-taxi

Tlf.: 311 444

Eisini gera vit ørindir fyri fólk

Internet

Sosialurin
www.sosialurin.fo

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

Lærarastørv við Gøtu skúla

Við Gøtu skúla eru hesi størv leys at søkja í skúlaárinum 2004/2005:

Vegna farloyvi verður søkt eftir lærara í tíðaravmarkað starv fyri skúlaárið 2004/2005. Starvið er fulltíðarstarv.

Vegna barnaburðarfarloyvi frá 1. august 2004 til uml. 20. januar 2005 verður søkt eftir lærara. Starvið er avlopstímar (uml. 24 tímar).

Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkum 18.1-27.4.

Umsóknirnar skulu vera skúlastýrinum í hendi 10. juli 2004.

Um nærri upplýsingar bert til at venda sær til formannin í skúlastýrinum tlf. 441614.

Gøtu Skúlastýri
v/ Maria Gregersen
510 Gøta

Lesið internet Sosialin !



Sosialurin
www.sosialurin.fo

Lýsið við brúktum bilum

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Vegna broytingar í vøruúrvælinum verður goymslan umskipað tessvegna selja vit við

STÓRUM AVSLÁTTRI partar av goymsluni

Talan er um : Máling, tapet, gólvrestir, tundurgólv, smáteppir, mattur, flísar og kina møblar

RING 316066

máling & gólv

Fyribils eru vit at hitta á Bóndaheygi 4

Nakað av goymsluni ætla vit at halda áfram við, og er tí ikki partur av goymslutømingini - tó fáa tey ið keypa hesar vørur eyka avsláttur um tey keypa av restgoymsluni

TIL DØMIS:

TAPET FYRI 0,- kr

Sosialurin 341800

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

Húsarhaldsskúli Føroya søkir

lærara (avloysara)

Søkt verður eftir einum føðslu- og húsarhaldsfrøðingi at undirvísa fulla tíð í tíðarskeiðnum 01.08.04-31.02.05.

Starvið fevnir um: Undirvísing í matgerð, kostlæru, vørukunnleika, reinføri o.ø. og annars at vera við til at fyriskipa ymisk tiltøk á skúlanum.

Vit kundu hugsa okkum: Lærara ið dugir at samstarva, er fyrikomandi, hevur áhuga at arbeiða saman við ungdómi og sum annars hevur hug at seta sín dám á skúlan.

Førleikakrøv:
Umsøkjarar skulu hava úbúgving sum føðslu- og húsarhaldsfrøðingur ella líknandi útbúgving.

Setanarviðurskifti: Starvið verður lønt í lønarflokkunum 18,1-27,4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

Fyrispurningar:
Um tú ynskir fleiri upplýsingar um starvið, kanst tú venda tær til leiðaran á skúlanum Jóhonnu á Tjaldraflötti.

Umsókn:
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og CV skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 12. juli 2004.

Húsarhaldsskúli Føroya
Stoksoyrarvegur 29 · 700 Klaksvík
tlf. 456974/216974 · fax 457664
teldupostur: hsf@post.olivant.fo

Pedagogur

Fyri pedagog í farloyvi verður søkt eftir pedagogi til barnagarð við 30 børnum í aldrinum 3–7 ár. Starvið er 30 tímar um vikuna á einari stovu við 15 børnum. Starvið verður at seta 16. august 2004 til 15. juli 2005 .

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Starvið er lønt á lønarstigi 10-16.

Nærri upplýsingar um starvið og stovnin fáast við at venda sær til leiðaran.

Umsókn saman við avritum av prógvi og viðmælum verður at senda stovninum í seinasta lagi fríggjadagin 09. juli 2004.

Um eingin pedagogur søkir starvið, verður hjálparfólk sett í starv.

Barnagarðurin Vípan
Vípuvegur 3
100 Tórshavn
Tlf. 31 75 35

Sosialurin

Leiðari

Sjálvsognarstovnurin Barnagarðurin á Teiginum søkir leiðara.

Søkt verður eftir leiðara at arbeiða 40 tímar um vikuna, at byrja 16. august 2004 ella eftir nærri avtalu.

Vit bjóða:
- eitt áhugavert starv, í einum nærumhvørvi har náttúran hevur stóran leiklut í gerandisdegnum
- møguleika fyri at seta dám á stovnin

Vit vænta at umsøkjarin:
- er útbúgvin pedagogur
- hevur leiðsluroyndir
- kann arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hugsjónir um virksemi á einum sjálvsognarstovni
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum
- dugir væl at samskifta og kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- hevur teldukunnleika

Setanarviðurskifti
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meira fæst at vita við at venda sær til barnagarðin á Teiginum, Randi Joensen, leiðara tlf. 361750.

Umsókn saman við viðmæli og upplýsingum um útbúgving skal sendast til Nevndina fyri Sjálvsognarstovnin Barnagarðin á Teiginum v/ Jacqueline Benzon, FO-210 Sandur í seinasta lagi 26. juni 2004 kl. 12.00.

Nevndin fyri Sjálvsognarstovnin á Teiginum

Íbúð í Keypmannahavn til sølu

Talan er um eina 2 verilsi eigaraíbúð á 56 kvm. við altan á 4. hæð á Hamletsgade 8 í Keypmannahavn.

Íbúðin hevur ein uttarugond, eina innarugongd við atgongd til sovikamar og baðirúm/wc, og eina stóra stovu við køki umframt altan. Íbúðin er í sera góðum standi og er partur av einum vælvirkandi íbúðarblokki við parkeringskjallara, elevatori, felagsvaskarí, spæliplássi, hybritneti, osv.

Íbúðin liggur centralt fyri í Kbh., 100 metrar frá Tagensvej og 300 metrar frá Nørrebrogade, og liggur nær við handilsgøtur, matstøð, parkir, ítróttarstøð v.m. Sera gott busssamband er frá íbúðarblokkinum.

Íbúðin varður seld til hægsta boð yvir kr. 1.000.000.

Áhugaði kunnu ringja á

Tlf. 211575
og fáa nærri at vita um íbúðina